## Á beding í Havn

Ikki er strandfaraskipið Sildberin stórt, her hann stendur á skipasmiðjuni í Havn. Ætlanin var at hann skuldi í sigling aftur beinanvegin, men nú er út við tríggjar vikur síðani hann fór á beding, skrivar heimasíðan bkv.fo. Sum skilst, er tað ein deilur til gearið, ið manglar, men Sildberin verður vantandi í sigling í hesi vikuni. So leingi røkir Súlan farleiðina millum Sand og Skúvoy.



## Borgarafundur um samanlegging

Borgarar í Hvannasunds kommunu seta hvørjum øðrum stevnu í skúlanum á Fossánesi í kvøld, at umrøðu møguliga kommunusamanlegging við Klaksvíkar kommunu. Á skránni verður umrøða av uppskotinum til sáttmála um sjálvbodna samanlegging við Klaksvíkar kommunu. Umboð fyri teir báðar samráðandi partarnar verða við á fundinum. Fundurin hevur pallborð við m.a. Pól Fuglø og Niels í Buð úr Hvannasunds kommunu og borgarstjóranum í Klaksvík, Steinbjørn O. Jacobsen. Árni Gregersen verður orðstýrari. Síðani verður vegleiðandi fólkaatkvøða í Hvannasunds kommunu mikudagin. Kommunustýrisfundur verður 18. september har politikararnir í Hvannasunds kommunu taka støðu til samanleggingina við Klaksvíkar kommunu. Politikararnir í Klaksvíkar kommunu taka støðu til kommunusamanleggingina á fyrst komandi býráðsfundi, ið eftir ætlan verður týsdagin 23. september

# Gíslatøka á Tjóðpallinum

**Komandi vikuskiftið frumframførir Tjóðpallurin leikin Nordost, ið byggir á gíslatøkuna í Dubrovka leikhúsinum í Moskva, har 170 fólk lótu lív**

SJÓNLEIKUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Á Tjóðpallinum leggja tey í løtuni seinastu hond á venjingarnar til leikin *Nordost*, sum verður frumsýndur komandi fríggjakvøld.

Leikurin Nordost eftir týska høvundan Torsten Buchsteiner, byggir á hendingina 23. oktober í 2002, tá 42 tjetjenar brádliga steðgaðu sýningnini av sangleikinum "Nordost" í Dubrovka leikhúsinum í Moskva og tóku 850 áskoðarar gíslar.

Kravið hjá gíslatakararunum var fullkomin afturtøka av russiska herinum úr Tjetjenina. Gíslatøkan vardi í 57 tímar og kostaði 170 fólkum lívið



*- Í leikinum "Nordost" siga tríggjar kvinnur frá, hvussu tær upplivdu ræðuligu gíslatøkuna í Dubrovka leikhúsinum í 2002*
*Mynd: Martin Sirkovsky*

### Persónligar upplivingar

Í leikinum "Nordost" hitta vit tríggjar kvinnur. Ein teirra er Tjetjeni og sjálvmorðsbumbukvinna, ein er lækni, ið er á náttarvakt hetta kvøldið og situr tí uttan fyri leikhúsið til reiðar at veita hjálp. Hin triða er farin at njóta sangleikin saman við manni og dóttur.

Spældar av Biritu Mohr, Súsonnu Tórgarð og Gunnvu Zachariasen siga hesar tríggjar kvinnurnar frá hendingini, og hvussu tær upplivdu lagnukvøldið tíma fyri tíma.

**FAKTA**

**»Nordost« á Tjóðpallinum**
**Leikarar: Birita Mohr, Súsanna Tórgarð og Gunnvá Zachariasen**
**Leikstjóri: Ria Torgarð**
**Týtt til føroyskt: André Niclasen**
**Pallur og ljós: Árni Baldvinsson og Símun Pauli Hansen**
**Búnar: Katrin Bonde**

**Leikurin verður frumsýndur á Tjóðpallinum fríggjakvøldið 19. september klokkan 20**



*Leikrithøvundurin Torsten Buchsteiner*

Um orsøkina til, at bara kvinnur eru við í leikinum, sigur leikhøvundurin Torsten Buchsteiner

- Eg sá fleiri sjónbandasamrøður um hertøkuna, har kvinnur søgdu frá sínum kenslum, tankum og ræðslum við nógv meiri innlivan enn menninir. Tað rakti meg. So eg valdi at skriva leikin uttan nakran mannligan persón.

Torsten Buchsteiner vísir á, at í Týsklandi kallaðu tey leikin "politiskt teatur". Fyri hann sum høvunda var tað hinvegin fyrst og fremst ræðuliga støðan, hesi fólkini vóru í, og teirra persónligu upplivilsi, sum lógu fremst í huga.

– Tað var sjónleikarin í mær sum allatíðina spurdi: Hvussu hava tey havt tað, hvussu er tað at vera so nær deyðanum? Eg haldi, tað eru kenslurnar, sum røra meg mest. Og tað politiska veksur so upp úr tí, sigur leikhøvundurin og leggur afturat.

– Eg vildi vísa, at ein og hvør av okkum kundi havt verið í hesi støðuni. Ein og hvør, sum ongan áhuga hevur í politikki kundi havt verið til ein musical onkustaðni millum Berlin, Londin, Madrid og Athen. Og eg eri vísur í, at ein og hvør stjórn hevði borið seg at á sama hátt.

### Illa lýddur leikur

Sambært Torsten Buchsteiner er tað í løtuni sera sárt at spæla "Nordost" í Russlandi. Leikurin er illa lýddur, tí tann tjetjenska Svarta Einkjan í leikinum verður lýst sum eitt menniskja eins væl og tann russiski gíslin.

– Um eg skrivaði ein leik um 9/11-álopið við Mohammed Atta í høvuðsleiklutinum, hevði neyvan nakað leikhús í USA sett hann upp, sigur høvundurin.

Leikurin "Nordost" er týddur til russiskt og verður hann lagdur fram sum upplestur í Russlandi í hesum mánaðinum. Leikhøvundurin væntar tó, at tað verður leingi, áðrenn nøkur rættilig framførsla av leikinum verður at síggja í Russlandi

– Eg má viðganga, at sjálv hendingin rakti meg ikki so nógv í 2002. Eg eigi einki sjónvarp, og sá tað fyrst á eini blaðforsíðu. Og eg hevði heldur ikki roknað við, at leikurin fór at vekja so stóran ans. Eg helt, at eingin hevði áhuga í hasum. Sum Olga í leikinum sigur: "Eg helt altíð, at tað var so langt burturi."

# Hanus Kamban bjóðaði á Café Europa

**Við toscasnittum, kaffi og upplestri úr sínum nýggja yrkingasavni *Café Europa* bjóðaði Hanus Kamban mongu gestunum inn í rættan kafédám í Miðlahúsinum fríggjadagin**

FRAMLØGA

Í sambandi við útgávuna av sínum fyrsta yrkingasavni, *Café Europa*, hevði Hanus Kamban bjóðað til móttøku í Miðlahúsinum í Vágsbotni fríggjadagin. Sera nógv fólk høvdu tikið av innbjóðingini, og tey flestu nýttu høvið at fáa eitt signerað eintak av nýggja yrkingasavninum.

Eftir at hava greitt eitt sindur frá útgávuni, las Hanus Kamban nakrar av yrkingunum upp. Eisini spældi Andrea Heindriksdóttir tvey løg á tvørfloytu, meðan gestirnir nutu ein góðan kaffimunn, eitt glas av víni ella onkra av leskiligu konditarakøkunum á borðinum.

Spenningurin millum fólk var rættiliga stórur, nú royndi høvundurin gevur út sítt fyrsta yrkingasavn. Hóast onkun av yrkingunum hevur verið á prenti fyrr, eru tær allarflestu heilt nýggjar og skrivaðar til júst hetta savnið.

-ave-



*Rættur kafédámur var í Miðlahúsinum fríggjadagin, tá Hanus Kamban legði fram sítt fyrsta yrkingasavn Café Europa*
*Mynd: Jens K. Vang*



*Flestu gestirnir nýttu høvið at fáa eitt signerað eintak av Café Europa við sær heim*
*Mynd: Jens K. Vang*